

## Keypa størri skip

Tað eru ikki bara føroyingar, sum leggja seg eftir brúka stór skip til at fiska uppisjóvarfisk. Tað sama gera íslendingar, og fyrradagin varð sáttmáli gjørdur um eitt uppisjóvarskip til reiðaríið Ísfélagið í Vestmannaoyggjunum. Talan er kortini ikki um eitt nýtt skip, men um norska skipið "Delta", sum kemur í flotan fyri eitt annað skip hjá reiðarínum. "Delta" er smíðað í Noregi í 1987 og tekur umleið 2.000 tons. Skipið, sum hevur fiskað við afrikonsku vesturstrondina seinastu árini, kemur til Íslands í næsta mánað

# Umhugsa undirsjóvartunnil fyri millum fimm og átta mia. krónur

**Við einum 18 kilometrar longum undirsjóvartunli ber til at binda Vestmannaoyggjarnar saman við íslendska meginlandið, men jarðfrøðin kann forða ætlanini**

TUNNILSÆTLAN
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

Um nakrar dagar fer íslendska ríkisstjórnin at umrøða eitt upprit, sum verkfrøðifyritøkan Sigurður Thoroddsen hevur gjørt fyri vegamyndugleikarnar um møguleikan fyri at gera ein undirsjóvartunnil millum meginlandið og Heimaey í Vestmannaoyggjunum.

Í uppritinum stendur, at tekniskt er tað møguligt at gera ein undirsjóvartunnil millum meginlandið og Vestmannaoyggjarnar, men verkfrøðingarnir seta kortini spurnartekin við, um tað er ráðiligt orsakað av teimum jarðfrøðiligu viðurskiftunum við oyggjarnar. Teir vísa á, at økið við Vestmannaoyggjarnar er rættiliga virkið sum jarðskjálvtaøki, og tí er tað ein spurningur, um tað er ráðiligt at gera ein tunnil langt niðri undir havbotninum har, siga verkfrøðingarnir í uppritinum.

### Dýr ætlan

Samtykkja politikararnir kortini at gera tunnilin, verður hann 18 kilometrar langur, og hann fer ætlandi at kosta einastaðni millum fimm og átta mia. krónur í okkara pengum. Í uppritinum stendur, at verður tunnilin fóðraður við betong tríggjar teir fyrstu kilometrarnar frá Vestmannaoyggjunum ímóti landi, verður kostnaðurin fyri tunnilin góðar 5 mia. krónur, men verða allir 18 kilometrarnir fóðraðir við betong, fer tunnilin at kosta um átta mia. kirónur.

Verkfrøðingarnir gera vart við, at fleiri jarðfrøðiligar og tekniskar kanningar mugu gerast, áðrenn ein endalig og neyvari kostnaðarmeting kann gerast. Tann spurningin skal stjórnin nú taka støðu til.



*Landeyjasandur inni á meginlandinum við Vestmannaoyggjunum í baksýni*

# Kommunusamanlegging fer at geva betri tænastur

**Tey eldru í Grønlandi vænta, at kommunusamanleggingin fer at koma teimum til góðar**

KOMMUNUSAMANLEGGING
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

Í Grønlandi hava politikararnir samtykt at leggja kommunurnar saman í nakrar stórar eindir, og á einari eldraráðstevnu um vikuskiftið kom fram, at í hvussu er tey eldru vænta sær nógv burtur úr samanleggingini.

-Vit í eldrafelagnum í Paamiut gleða okkum til kommunusamanleggingina, og vit vænta, at tænastan til tey eldru fer at batna, soleiðis at øll fáa fyrimun av, at kommunan verður størri, segði formaðurin í eldrafelagnum í Paamiut, Sem Willumsen, á ráðstevnuni.

Samanleggingin ber millum annað í sær, at Paamiut og høvuðsstaðurin Nuuk koma í somu kommunu, og Sem Willumsen ivast ikki í, at tað eru eisini onnur enn tey eldru, sum fáa gagn av samanleggingini. Eitt nú væntar hann, at eisini børnini fara at fáa ágóða av, at kommunurnar verða størri.



*Tey eldru í Paamiut vænta sær ágóða av kommunusamanleggingini*